# Vársetan

## frá 9. til 21. mai 2024






Síða 2

### "UM EG KUNDI KVØÐIÐ..."

Vit hoyra frálíka sangaran, tónaskaldið og tónleikaran Stanley Samuesen og práta eisini við hann um alt frá A-duri til Alzheimers, sum hann nú er raktur av.



Síða 3

### LÁTUR & LJÓMUR

Ávaring! Doyggj ikki í látri! Hilmar Jan verður aftur í essinum. Vit sleppa eisini at njóta hús-duo okkara við Kim Hansen og Jóhannusi á Rógvu Joensen.



Síða 4

### AMIGOS Í SÓLORKU

Nú koma teir endiliga á okkara pallar – á Vaglinum eins væl og í Klubbanum. Ólavur Øster, Jógvan Olsen og Jóan Magnus Danielsen manna dansibólkin Amigos.



Síða 4

### TILTØK & ÚTFERÐIR

Vit vitja nógv vøkur og spennandi støð, frá fiskamarknaðinum og appilsinlundini til Skøltanna Helli, fjallabygdina Guadalest, vøkru Altea og Benidorm Palace Show



Síða 6

### GISTING & PRÍSIR

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 50.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Sí eisini prís á síðu 5




# “Um eg kundi kvøðið...” • Stanley í Sólorku

Vit fegnast stórliga um, at tónaskaldið, tónleikarin og sangarin Stanley Samuelsen kemur at vitja vársetu okkara. Stanley er musikalskur úrmælingur, og føroyingar kenna mong av hansara vøkru løgum, eitt nú ‘Um eg kundi kvøðið’ og ‘Tá eg verði gamal’.

Við sínum góðu gávum og professionella hugburði hevur Stanley sungið og spælt kring Europa og enntá eisini í USA. Í vár sleppa gestir okkara at uppliva hann bæði til hugnaløturnar á Vaglinum og í dansinum í Klubbanum.

Á Vaglinum fara vit at práta við Stanley um lív hansara – um barndómin og ungdómsárini í Fuglafirði og um lív hansara úti í stóru verð, síðani hann fyri 54 árum síðani flutti til Danmarkar sum 19 ára gamal.

Vit fara eisini at tríva í eitt serligt tema í samsvari við endamál okkara um ‘góðalívið uttan mørk’. Stanley er raktur av Alzheimer’s sjúku, og vit fara at skifta orð um hetta við hann og Merete, konu og lívsfelaga hansara.







sólorka

# Látur & Ljómur

**Ávaring! Doyggj ikki í látri! Hilmar Jan verður aftur í essinum.
Vit sleppa eisini at njóta hús-duo okkara við Kim Hansen
og Jóhannusi á Rógvu Joensen**







# Fyrstafloks tónleikur á Vagli og í Klubba

**Vit fara at lurta og dansa eftir so frægum tónleikarum sum Amigos (Ólavi Øster, Jógvani Olsen og Jóan Magnusi Danielsen), Stanley Samuelsen saman við hús-duo okkara (Kim Hansen og Jóhannusi á Rógvu Joensen) umframt lokalu bólkunum Black Glitter og Clandestinos.**









# Hópurin av túrum og tiltøkum





# Albir Garden Resort

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 50.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Umframt svimjihyljarnar hava vit okkara egna vatnland, og tú kanst sjálvandi brúka bæði venjingarrúmið og hitarúmið.

Tað er eisini her í tí stóra urtagarðinum, at tú kanst njóta allar løturnar á Vaglinum og í Klubbanum umframt at gera fimleik og aðrar rørslur á Vøllinum

Hiðani tekur tað bert einar 15 minuttir at spáka oman á strondina gjøgnum miðbýin fram við nógvum matstovum, kaféum og krambúðum.







www.albirgardenresort.com

solorka



**Prísur: kr. 15.900,-**
**fyri hvønn, um tvey gista saman**
**(Eyka fyri einakamar: kr. 1.800,-)**

**PRÍSURIN FEVNIR UM**

- **Beinleiðis flúgving / busskoyring**
- **Gisting**
- **Fulla pensjón v/drykkjuvørum**
- **Føroyskar vertir, hjálparfólk og lækna**
- **Fimleik, dans og aðra rørslu**
- **Reseptión á Vaglinum við ókeypis kafé og spennandi skrá hvønn dag klokkan 18**
- **Kvøldarhugna og dans við livandi tónleiki**
- **Høvi at tekna teg til nógvar áhugaverdar útferðir fyri lagalig eykagjøld.**

**solorka@solorka.com • tlf. 221090**